# Gravsteinur á alnetinum

**ALNETIÐ.** Eitt danskt felag bjóðar nú avvarðandi at seta ein gravstein yvir teirra kæru á alnetinum




*Eyðun Klakstein*

Møguleikarnir fyri at brúka alnetið eru markleysir, og nú bjóðar eitt danskt felag eina nýggja tænastu fram.

Á www.mindesiden.dk kunnu avvarðandi seta ein gravstein yvir tey, sum eru farin. Møguleiki er at leggja myndir, minningarorð og upplýsingar um tey, sum eru farin, á síðuna hjá felagnum av Fjóni.

Fyri tveimum vikum síðani greiddu vit frá, at tað bar til at keypa njósnaramyndir yvir alnetið, men hesin nýggi møguleiki er bara ein av fleiri merkisverdum tiltøkum.

Vanligu kirkjugarðarnir røkka ikki langt út í heim, men tað ger alnetið, og framyvir verður tað kanska líka lætt hjá onkrum skyldfólki í útheiminum at minnast onkran yvir alnetið, sum tað er hjá teimum, sum standa á kirkjugarðinum heima í Føroyum.

- Tað er nógv at hugsa um í sambandi við deyða og jarðarferð, men tað øll viðurskifti eru fingin upp á pláss, eru tað ofta minni, sum tey avvarðandi vilja hava fram, og tað er við hesum í huga, at mindesiden.dk bjóðar seg fram.

Soleiðis verður grundgivið fyri tiltakinum á heimasíðuni hjá mindesiden.dk

- Tað kann helst tykjast løgið fyri mong at fáa gera eina minnisíðu á alnetinum, men hetta er bara ein nýggjur miðil, líka sum bløðini einaferð vóru tað, siga fólkini aftanfyri heimasíðuna.

**Ein møguleiki afturat**

Mindesiden.dk sigur seg bjóða fram møguleikan við virðing fyri teimum, sum eru farin, og fyri at avvarðandi kunnu lata minnini livað á alnetinum.

Ein minningarorð ella ein tøkk í einum blaði er horvin dagin eftir, at tað hevur verið á prenti, meðan mindesiden.dk sigur seg kunna bjóða fólki pláss á teirra síðu fyri alla tíð - og í hvussu so er 20 ár, sjálvt um fyritøkan skuldi givist.

Tað kostar góðar 1000 krónur at fáa sær eina síðu hjá donsku fyritøkuni, og síðani eru eykagjøld alt eftir hvussu umfatandi síðan skal verða við myndum og teksti.

Fyritøkan heldur, at hetta er ein nýggjur møguleiki afturat gravsteinum á kirkjugørðum, og annars skulu hesi ikki samanlíknast. Alnetið kann tryggja komandi ættarliðum minni um skyldfólk, tey ongantíð kendu, og tað heldur fyritøkan á Fjóni verða ein vakran tanka.

Tað er tað ivaleyst eisini - www í friði.

**Eg meini tað**

*Vegna forfall er teigurin »Eg meini tað« ikki við í 2'aranum hesaferð.*



**Bye Bye Blue Bird vann sunnudagin eina virðisløn á altjóða filmsstevnu í Hollandi. – Hetta er størsti heiður, eg nakrantíð havi fingið, sigur Katrin Ottarsdóttir, leikstjóri**

***(framhald av forsíðuni)***

varhugan av, at okkurt kundi verða ávegis, greiðir Katrin Ottarsdóttir frá.

– Eg fór heim til Danmarkar, eftir at eg hevði verið á stevnuni í nakrar dagar, men kvøldið fyri, at virðislønirnar skuldu handast, varð eg uppringd av fyrireikarunum, sum bóðu meg koma til handanina. Og tá fekk eg fyrsta ítøkiliga teknið um, at kanska var ein virðisløn í luftini.

Og soleiðis var eisini, tí saman við einum kinesiskum og einum argentinskum filmi, fekk Bye Bye Blue Bird eina av teimum tignarligu virðislønunum. Saman við henni fylgir eisini sjónvarps- og biografsýning í Hollandi.

**Maðurin úr Mannheim**

Danska Filmsinstituttið sendi fýra danskar filmar við til stevnuna í Rotterdam, men Bye Bye Blue Bird var ikki ein teirra.

Á eini filmstevnu í Mannheim møtti Katrin einum manni, sum hevði samband við stevnuna í Rotterdam. Hann bæð um eitt eintak av filminum, sum fekk sera góða umtalu á hesi stevnu.

– Eg hugsaði ikki meira um hetta, og tí kom tað óvart á meg, at filmurin knappliga var við í kappingini á stevnuni í Rotterdam, sigur Katrin Ottarsdóttir.

Í grundgevingini fyri at lata virðislønina verður sagt, at Bye Bye Blue Bird er ein hjartaheitur filmur við einum serligum brúki av litum og pallmyndum, og hetta ger hann til eina sanna njóting.

Filmsstevnan í Rotterdam heldur sína fremstu uppgávu vera at geva sjálvstøðugum filmsskaparum møguleikan at náa eini størri fjøld, enn teir gera í heimlandinum.

**Danskir fordómar**

Filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir fekk vánaliga móttøku í Danmark, hóast danska filmsinstituttið hevur fíggjað ein stóran part av filminum.

Ein týðandi orsøk til hetta er, at pengarnir, sum Bye Bye Blue Bird hevði at føra seg fram við, vóru ikki í námind av teimum upphæddum, sum aðrir filmar hava til PR-ætlanina.

– Tað ræður um at rópa hart, tá tú skalt hava fólk at geva einum filmi gætur, og við okkara 100.000 krónum høvdu vit avmarkaðar møguleikar at gera reklamu fyri filminum, sigur Katrin Ottarsdóttir.

Eina viku eftir at føroyski filmurin varð frumsýndur í Danmark, kom danski filmurin Bleeder út, og hann brúkti eina millión krónur til lýsingar.

Ein onnur frágreiðing til vánaligu undirtøkuni í Danmark, heldur Katrin, eru donsku fordómarnir mótvegis Føroyum.

– Tað hevur ligið í bilbuktini, at hesin filmurin var føroyskur, og eg havi hoyrt frá fólki, sum skuldu til filmin í Keypmannhavn, at daman í billettsøluni ávaraði ímóti, at filmurin var altso føroyskur, og tað var føroysk tala. Hon líkasum ávaraði fólki ímóti filminum, sigur Katrin Ottarsdóttir.

– Tað er ein øðiligur lætti at sleppa undan teimum donsku fordómunum, tá eg eri á filmsstevnum í Týsklandi og Hollandil. Har eru tey veruliga áhugað í okkara landi og halda filmin verða spennandi.

Tað sæst eisini aftur í, at virðislønin í Hollandi er tann næsta, sum Bye Bye Blue Bird fær. Hin fyrra var á eini norðurlendskari og baltiskari stevnu í Lübeck.

Katrin Ottarsdóttir vónar nú, at filmurin hjá henni kann verða seldur til onnur lond, eftir at hollendska virðislønin varð latin honum.

**Ikki føroyskt næstu ferð**

Katrin Ottarsdóttir er farin undir fyrireikingarnar til ein nýggjan film. Hon skal fyrst skaffa pengarnar, sum skulu til fyri at gera hugskotið til veruleika, og tað verður helst lættari eftir virðislønina í Rotterdam, hóast tað eingin trygd er fyri, at hon finnur fíggingina.

Næsti filmurin hjá henni verður ikki á føroyskum, men helst á enskum.

– Næsti filmurin kann ganga fyri seg í einum og hvørjum europeiskum stórbýi, har gamlir býarpartar eru, og tí havi eg ikki lagt meg eftir nøkrum ávísum landi ella býi. Tað veldst um hvør vil fíggja filmin, sigur Katrin Ottarsdóttir.

Enn er filmurin bert eitt hugskot um eina leikgongd, og tá fígging er funnin skal leikritið skrivast, og síðani skal gongd setast á aðrar fyrireikingar og upptøkur. Tí liggur projektið nakað frammi í tíðini.

Men til nýggi filmurin verður veruleiki, kann føroyski leikstjórin fegnast um, at seinasti filmurin fær rósur í útlandinum, har danskir fordómar ikki røkka.



**Filmurin hjá Katrini Ottarsdóttir fekk vánaliga móttøku í Danmark, men tað eru frágreiðingar til tað**

**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 19, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720. **Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein. **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Tey ungu skulu royna seg

**TÓNLEIKUR.** Í eini kapping millum 17 ungar tónleikarar, vunnu seks teirra kjansin sum solistar hjá Føroya Symfoniorkestri



**Seks ungir tónleikarar skulu fyri fyrstu ferð royna seg sum solistar saman við Føroya Symfoniorkestrið á eini konsert í Norðurlandahúsinum um tvær vikur. Mynd: Jens Kristian Vang**

*Eyðun Klakstein*

Um tvær vikur skulu seks ungir tónleikarar royna seg sum solistar hjá Føroya Symfoniorkestri fyri fyrstu ferð.

Talan er um tveir dreingir og fýra gentur, og tey eru úr 14 og upp í 18 ár. Tey hava fingið kjansin, eftir at tey gjørdust vinnarar í kapping millum 17 evnaríkar tónleikarar.

Hendan kappingin var í januar mánaði, og 28. februar skulu tey væntandi standa frammanfyri fullum sali í Norðurlandahúsinum og spæla verk eftir millum annað Mozart, Haydn og Vivaldi við føroyska symfoniorkestrinum í bakinum.

–Tað er eitt sindur undarligt við kapping millum tónleikarar, men vit vita eisini, at kapping ofta hækkar um støðið, og tí royna vit hetta tiltakið, sigur Martin Mouritsen, sum er leiðari av Føroya Musikkskúla.

– Tað vóru nógvir dugnaligir tónleikarar við í kappingini, og fleiri enn hesir seks høvdu kunnað verið solistar, men nú fall valið á hesi, og eg eri sannførdur um, at tey fara at klára hesa stóru uppgávuna. Tey hava øll royndir í at framføra, hóast hetta helst verður størsta avbjóðingin hjá teimum higartil, sigur Martin Mouritsen, sum eisini er fastur dirigentur hjá Føroya Symfoniorkestri.

**Stúrir fyri konsertini**

Tað eru Føroya Symfoniorkestur og Føroya Musikkskúli sum í felag skipa fyri nýggja tiltakinum.

– Eitt av endamálunum hjá Føroya Symfoniorkestri er at geva framkomnum næmingum møguleika at vera við í symfoniskum tónleiki og at venja og spæla í størri høpi, sigur Føroya Symfoniorkestur í einum tíðindaskrivi, sum sent er fjølmiðlunum.

– Í løtuni eru tað fleiri næmingar, sum lúka krøvini fyri hesum, og vit vóna, at tað verða fleiri, sum við ídni fara at náa hesum máli framyvir.

Í Føroya Symfoniorkestri, sum varð stovnað í 1983, eru fleiri ungir tónleikarar, men tað er ikki vanligt, at hesir eru solistar hjá orkestrinum.

Ein av teimum, sum nú skal royna seg, er 17 ára gamla Guðny Næs.

– Hetta er ein spennandi avbjóðing, men eg eri stúri eitt sindur fyri konsertini. Eg ætli mær at venja nógv áðrenn framførsluna, sigur hon.

Guðny spælir violin, og hon skal spæla vøkru romansuna í F-dur fyri violin og orkestur, sum Ludvig van Beethoven hevur skrivað.

– Hetta er eitt pent og romantiskt stykki, og mær dámar tað væl. Eg havi valt tað saman við læraranum hjá mær, og eg rokni við, at fólk kenna hesa romansuna, sigur Guðny Næs.

**Fínt við kapping**

Marjun Heerup Olsen spælir tvørfloytu, og hon fer 27. februar at spæla fyrsta sats úr konsert fyri floytu og orkestur í G-dur eftir Wolfgang Amadeus Mozart.

– Hetta verður eitt stórt upplivilsi. Eg eri ikki vorðin nervøs enn, men tað fer ivaleyst at koma, tá konsertin nærkast. Nú havi eg havt hálsbruna, og tí havi eg ikki fingið vant seinastu dagarnar, men eg ætli mær sjálvandi at venja nógv áðrenn konsertina, sigur Marjun.

– Tað er fínt við kapping millum tónleikarar, men eg haldi, at tað er eitt sindur keðiligt at kappast móti fólki, sum eg kenni. Men tað er einki at ivast í, at slík kapping fær okkum at gera meira við tað.

Martin Mouritsen, leiðari av Føroya Musikkskúla, leggur dent á, at kapping er ikki endamál við musikkskúlanum.

– Vit skulu hava eina breidd og ein topp, og slíkt tiltak kann verða við til at geva okkum onkrar enn betri ungar tónleikarar, sigur hann. 1100 næmingar kring alt landið eru í skipanini hjá Føroya Musikkskúla.

Av teimum seks fólkunum, sum nú skulu verða solistar, eru fimm úr Havn, og tað er ikki undarligt.

– Tað eru serliga fólkini í høvuðsstaðnum, sum hava ambitiónir við tónleikinum, sigur Martin Mouritsen.

**Fólkini og tónleikurin**

Næsta vikuskiftið fara tey seks ungfólkini at venja saman við Føroya Symfoniorkestri, og um tvær vikur er tað álvari, tá tey fara á pallin í Norðurlandahúsinum.

14 ára gamli Johan Hentze, sum spælir á trompet, fer at spæla variasjónir yvir lagið Napoli eftir tónasetaran Hermann Bellstedt.

Jón Festirstein, sum eisini er 14 ára gamal, spælir violin og fer at framføra fyrsta sats úr violinkonsert í a-moll eftir Antonio Vivaldi.

Guðny Næs er 17 ár, og hon fer at spæla romansu í F-dur fyri violin og orkestur eftir Ludvig van Beethoven.

17 ára gamla Marjun Heerup Olsen spælir tvørfloytu, og hon skal spæla fyrsta satsin úr konsert fyri floytu og orkestur í G-dur eftir Wolfgang Amadeus Mozart.

Kristina Dalsgarð, sum er 16 ára, spælir klaver, og hon fer at spæla fyrsta satsin úr konsert fyri floytu og orkestur eftir Joseph Haydn.

Og seinasti tónleikarin er Andrea á Dul Mortensen, sum er 18 ára gomul. Hon heldur fram við 2. og 3. satsi úr somu konsert í D-dur fyri klaver og orkestur eftir Joseph Haydn.

Konsertin verður sunnudagin 27. februar klokkan 16.00 í Norðurlandahúsinum.